ALFA transport
Vit átaka okkum allan vøruflutning, bæði við vørubili og bili við lyft.
Til kappingarførar prísir.
Ring og fá eitt gott tilboð
tel 50 51 91 • t-post: alfa@kallnet.fo

# Jamen - hví selja tit ikki Føroya Tele - hvørjum bíða tit eftir???

**Poul Michelsen**
*Løgtingsmaður*



Ein fyrispurningur til leiðslu og nevnd í Føroya Tele.

Eg vil nýta høvi til at takka SVF fyri eitt gott kjak í gjárskvøldi. Tøkkin fer sjálvsagt til ein væl fyrireikaðan og upplagdan vert og til teir tríggjar panelluttakararnar Olav Enomoto, Petur Zachariasen og Trónda Djurhuus.

Sendingin setti fokus á samskifti, teldutøkni og gransking og hvussu umráðandi tað er – um samfelagið framvegis skal roknast, sum eitt framkomið land – at menna útbúgvingina av tøkni í øllum útbúgvingarliðum.

Sendingin vísti á, at framtíðin tó sá alt annað enn bjørt út, hetta mest orsaka av at ongin peningur er tøkur at útbúgva og granska fyri.

Hetta eru ikki ókendar niðurstøður, og tá vita tey flestu, hvat klokkan hevur sligið:

Nú skal landskassin uppí leikin!! Sjónvarpstóli verður sløkt og prátað verður um okkurt annað.

## Sel Føroya Tele !!!

Sanniliga hoyrdi tú rætt - sel Føroya Tele og brúka peningin til at menna samfelagið innan tøkni og gransking - segði Tróndur Djurhuus.

Tróndur er ikki ein og hvør. Gott nokk umboðaði hann Bitland í sendingini, men sum hann sjálvur gjørdi vart við, so var hann ein av leiðandi persónunum í Føroya Tele.

Boðskapurin frá Trónda kendist sum eitt várligt lot í vinnupolitiskum samanhangi. Neyvan nakrantíð hevur frustratiónini innan vinnu verið størri enn hon er nú. Vit hava kjakast og fundast til húðleysheit, og hóast allar niðurstøðurnar greitt siga - privatiserað vinnuna - so hendir beint tað øvugta hjá okkum. Landsstýrið/vinnumálaráðið samlar ístaðin uppá almenn partafeløg.

## Hví selja tit ikki ??

Tí er spurningurin til leiðslu og nevnd:

Hví selja tit ikki Føroya Tele? Hvør og hvat steðgar tykkum? Hørjum bíða tit eftir?

Útmeldingin hjá Trónda var sera greið. Ein søla av Føroya Tele vildi bæði menna Føroya Tele, sum fyritøku og føroyska samfelagið. Eg eri ikki í iva, at Tróndur hevur rætt, og eg kenni nógv vinnulívs-fólk, sum eru samd við Trónda.

Tori at siga at - so at siga alt føroya fólk - er samt við Trónda.

Vil fegin hava eitt alment svar frá leiðslu og nevnd í Føroya Tele.

**NB:** Eitt hugskot til Boga Godtfred sjónvarpsvert. Læt næsta kjakið í SFV snúgva seg um: Hví selja/privatisera vit ikki almennum partafeløgum??

Til sølu
Toyota Avensis 2,0 TD



Toyota Avensis 2,0 TD · Árg. 2000
Væl røktur · Í sera góðum standi
km. 77.000
Lagalig fígging
Útgjald bert kr. 31.000,-
Restina práta vit um
Opið leygardagin frá 11 - 15
Sí meira á www.bilfridkan.fo
Bilfríðkan á Hjalla
Tel 35 73 00 ella 21 73 00
landsins lagaligasta brúktbilafígging

# Paula yvirtekur »Salong Tótu«

EIGARASKIFTI
*Guðrun Jacobsen*
*og Annika Isfeldt*

Paula McGavin Magnussen yvirtekur »Salong Tótu« hálvan mars frá Tórunn (vanliga nevnd Tóta) Sørensen.

Paula, sum er lærd frisør í »Kvilt Hárfríðkuni« og eisini hevur arbeitt í »SaxO'føn«", er rættiliga nýggj sum frisør í mun til Tótu, sum hevur verið í fakinum í 45 ár.

Tóta varð útlærd til frisør í Føroyum í 1964 og fór so niður til Danmarkar. Har arbeiddi hon í einari fínari salong í Vejle, har hon klippti nógvum kendum dønum. Aftur í Føroyum fekk hon sína egnu salong, og 1. juni1987 varð klárt at flyta inn í nýggj hølir í Magnus Heinarsonargøtu, har salongin enn er.

Tóta fer kortini at arbeiða í salongini á niðursetta tíð. Hon hevur eina heilsølu á ovaru hædd, har hon selur frisørartiklar, og hetta fer hon nú at konsentrera seg meir um.

Tá salongin varð bygd, var meiningin, at dóttir Tótu skuldi yvirtaka salongina eftir Tótu, tí hon var í læru sum frisør tá. Men hon arbeiðir nú sum frisør í Keypmannahavn, og tí yvirtekur Paula. Tó fer salongin framvegis at eita »Salong Tóta«.



*Um hálvan mars tekur Paula McGavin Magnussen yvir »Salong Tótu«, sum Tóta Sørensen hevur rikið síðani 1969*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Kvøldseta á Kambsdali

TÍÐINDASKRIV

Veturin hevur verið drúgvur og treiskur. Tað kann væl vera, at hann ikki heilt hevur slept takinum enn, og at vit framvegis eiga illveður og kava á. Men tað eru eisini tekin um vár, og at tað nú gongur móti ljósari tíðum. Fyrstu tjøldrini hava verið at sæð, ítróttarfólk eru at síggja á vallum, og um ikki so nógvar vikur fara kappróðrarbátarnir at verða dignir úr neystunum.

Eitt afturvendandi tiltak hesa tíðina á árinum er almenna kvøldsetan, sum er á studentaskúlanum á Kambsdal. Kvøldsetan verður í kvøld, hóskvøldið 10. mars kl. 19.30.

Skráin er fjøltáttað, og tað eru núverandi og fyrrverandi næmingar, sum standa fyri tí, sum er á skránni. Sanginum og tónleikinum syrgja 1. flokkarnir og hástigs holdini í tónleiki fyri 1.a fer at sýna lancierdans, og næmingar, sum hava samfelagsfrøði, fara at hava eitt innslag um mannarættindi.

Viðhvørt vitja fyrrverandi næmingar og greiða frá, hvussu teirra tíð á skúlanum var, og hvat teir hava tikist við, síðani teir fóru úr skúlanum. Hesa ferð fer Hilmar Sam Lamhauge á Glyvrum at greiða frá. Hann leyk studentsprógv í 1998, og nú hevur hann í fleiri ár verið leiðari á Statoil støðini í Saltangará.

Í frítíðini hevur Hilmar Sam Lamhauge fingist nógv við kapproður. Hann fór at rógva við Tjaldrinum í 1994, og hann hevur verið við til at vunnið nógvar sigrar við Eysturoyingi. Í ár er Hilmar Sam venjari hjá Kapproðrarfelagnum NSÍ. Á kvøldsetuni fer Hilmar Sam at hugleiða um kapproður, og okkurt fer at verða borið fram, sum er skrivað og yrkt um føroyska bátin.

Næmingar skipa fyri kafé, og tað fer í kvøld at bera til at síggja listarverk hjá Philippe Carré, sum í hesum døgum hanga á studentaskúl-anum.

Kvøldsetan verður kl. 19.30. Øll eru hjartaliga vælkomin, og atgongdin er ókeypis.

Eysturoyar Røktar- og Ellisheim

Søkt verður eftir økonomu

– 40 tímar um vikuna – at byrja 01.04.05 ella eftir nærri avtalu.

Løn- og setanarviðurskifti sambært avtalu við Økonomafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

Nærri starvinum viðvíkjandi fæst at vita frá økonomuni á tlf. 448617 ella 448201 lokal 29.

Umsókn, saman við prógvi, viðmæli v.m. skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 23.03.05.

Eysturoyar Røktar- og Ellisheim
FO-620 Runavík

Sosialurin
www.sosialurin.fo